VERKSTOVUR

## // VERKSTOVA 1

### Havumhvørvi og burðardygg tilfeingisumsiting

Verkstovan setur fokus á livandi havumhvørvi, hvussu tað verður ávirkað av veðurlagsbroytingum, og hvussu livandi tilfeingi kann verða gagnnýtt á burðardyggan hátt. Evni, ið verða tikin upp til viðgerðar, fevna um havfrøði, burðardygg búskaparlig útlit fyri vistfrøðiligt tilfeingi , aling eins og umsitingarskipanir fyri burðardygga gagnnýtslu av rávøru.

**Fundarstjóri:** Kate Sanderson

09:30-09:40: Innleiðing

09:40-10:00: Michaela Aschan – Árin av fiskiveiðu og veðurlagsbroytingum á vistfrøðiskipanina í Norður Atlantshavi. Ein samanbering av toskastovnum í Barentshavinum og Norður Atlantshavinum og metingar av framtíðar útlit í mun til hitabroytingar í sjónum.

10:00-10:15: Eyðfinn Jacobsen – Føroya Banki sum havfrøðiligt granskingarøki

10:15-10:30: Helle Siegstad – Veðurlagsbroytingar og fylgirnar fyri havtilfeingi undir Grønlandi og nýggjum fiskigrunnum í polarsjógvi

10:30-10:45: Steðgur

10:45-11:05: Hjálmar Hátún – Veðurlag á havinum og svartkjaftur í Norðuratlantshavi

11:05-11:25: Knud Simonsen – Nýggjir aliháttir á streymasjógvi, ið minka um umhvørvislig árin

11:25-11:45: Alyn Smith – Fiskipolitikkur ES, veðurlagsbroytingar og umsitingarligar avleiðingar

11:45-12:00: Kjak

15:30-16:00: Steðgur

## // VERKSTOVA 2

### Burðardygg vinna í mun til marknað, umdømi og íløgur

Verkstovan setur fokus á marknaðarmenning og árin á atgongd til marknaðir, umdømi, prísir og íløgur. Evni, ið verða tikin upp til viðgerðar, fevna um keypararák; krøv um prófføri av burðardygd og øðrum viðkomandi evnum í hesum sambandi; viðkvæmi av marknaðarbroytingum; leiklutin og ætlanir hjá íleggjarum á hesum marknaðum.

**Fundarstjóri:** Jens Christian S. Justinussen

13:00-13:10: Innleiðing

13:10-13:30: Orri Vígfússon – Hvussu Norðuratlantiska umhvørvið kann verða fyrimynd innan lívfrøðiligt margfeldni og burðardygga menning

13:30-13:45: L. Gilli Trónd – Framløga av eini taraalingarverkætlan – ein nýggjur háttur at framleiða bioorku

13:45-14:00: Hannes Gislason – Aling av toski sum burðardygg loysn í mun til veiddan tosk

14:00-14:15: Steðgur

14:15-14:30: Kjartan Ólafsson – Árin av burðardygd á íløguútlitini innan fiski- og sjóvinnu

14:30-14:50: Ruben Hurkens – Dømir um hvussu handilsketur brúka viðurskifti innan burðardygd í síni marknaðarføring

14:50-15:10: Petter Olsen – Kappingar-fyrimunir sum fylgja av við prófføslu burðardygd

15:10-15:30: Kjak

15:30-16:00: Steðgur

## // VERKSTOVA 3

### Nýskapan innan orku og umhvørvisliga tøkni á sjógvi og landi

Verkstovan setur fokus á tøkniliga nýskapan í mun til veðurlag, orku og umhvørvi hjá oyggjasamfeløgum. Evni, ið verða tikin upp til viðgerðar, fevna um orkunýtslu og orkusparingar innan havflutning, varandi orku og serligu avbjóðingarnar, ið eru tengdar at gagnnýtslu av varandi orku í smærri oyggjasamfeløgum.

**Fundarstjóri:** Signar Heinesen

09:30-09:40: Innleiðing

09:40-09:55: Jan Allan Müller – Fyrimunir hjá fiskimonnum, og samstundis verja umhvørvi

09:55-10:15: Dánjal Jákup Jacobsen - Green Steam: Ein nýggj loysn sum minkar um orkunýtslu á sjónum

10:15-10:30: Olaf Olsen – Ymiskir hættir fyri orkusparing í fiskiflotanum grundað á hagtalsroyndir

10:30-10:45: Steðgur

10:45-11:05: Hákun Djurhuus – Avbjóðingar í einum oyggjasamfelagi við atliti til at framleiða varandi orku

11:05-11:25: Anne Merrild Hansen – Varandi orka, stórídnaður og grønlendska tvístøðan

11:25-11:40: Haraldur Ólafsson – Eru størstu veðurlagsbroytingarnar á einum støði, ið vit enn ikki megna at loysa?

11:40-12:00: Kjak

15:30-16:00: Steðgur

## // VERKSTOVA 4

### TransAtlantic Climate Institute (TACIT) sum ein vitanarmiðdepil

Verkstovan setur fokus á stovnsetan av einum altjóða granskingar- og nýskapanardepli í Føroyum, nevndur TransAtlantic Climate Institute (TACIT). Evni, ið verða tikin upp til viðgerðar, fevna um møgulig granskingarøki, har Føroyar mega skapa og breiða út virðismikla vitan. Spurt verður, hvussu TACIT kann virka sum vitanarkervi fyri transatlantiskari gransking og menning innan havumhvørvi. Eisini verður kjakast um møguleikar fyri fígging av slíkum stovni, , og hvussu TACIT kann koma at ávirka føroyska samfelagi.

**Fundarstjóri:** Ólavur Gregersen

13:00-13:10: Innleiðing

13:10-13:30: Sigríður Thórmóðsdóttir –Leikluturin hjá nýskapan at tillaga umhvørvisbroytingar og krøv

13:30-13:45: Bogi Bech Jensen – Granskingarmøguleikar í Føroyum

13:45-14:00: Annika Sølvará – Eitt yvirlit ývir vísindaliga íkast føroyinga higartil í samband við veðurlags- og havfrøðiliga gransking og menning

14:10-14:15: Steðgur

14:15-14:35: Peter B. Rhines – Framløga av eini transatlantiskari granskingar- og menningarverkætlan innan havumhvørvi

14:35-14:55: Corinna Schrum –Master í havvistfrøðiskipanum og veðurlagi: ein hægri norðurlendsk útbúgving

14:55-15:15: Vilhjálmur Nielsen – Framløga av forkanning av TACIT

15:10-15:30: Kjak

15:30-16:00: Steðgur

## // PALLBORÐSFUNDUR

**Orðstýrari:** Magni Arge

16:00-16:10: Framløga av úrslitinum av verkstovu 1 (Kate Sanderson)

16:10-16:20: Framløga av úrslitinum av verkstovu 2 (Jens Christian Svabo Justinussen)

16:20-16:30: Framløga av úrslitinum av verkstovu 3 (Signar Heinesen)

16:30-16:40: Framløga av úrslitinum av verkstovu 4 (Ólavur Gregersen)

16:40-17:10: Spurningar & svar (pallborð við fundarstjórunum)

17:10-17:15: Ráðstevnan endar

Eik FØROYA BANKI FRAMTAK norden FØROYA TELE